

claus reistrup

At útbúgva seg til oljuvinnuna

Í hesari grein verður nomið við nøkur sjónarmið viðvikjandi útbúgvingum til oljuvinnuna, sum bæði einstaklingurin og politiska skipanin mugu taka støðu til, um ella tá ið vit fáa eina oljuvinnu.

Greinin viðger 2 høvuðsháttir, nevniliga útbúgvingar, sum vanliga eru partur av ella framhald av einari útbúgvingargongd, sum tann lesandi er inni í, og útbúgvingar, sum ein, ið arbeiðir í vinnulívinum, noyðist at taka fyri at fáa vinnuførleika til oljuvinnuna.

Vanligar útbúgvingar

Sum útbúgvingarnevndin, ið landsstýrismaðurin í skúlamálum setti at útgreina útbúgvingartørvin í sambandi við eina møguliga oljuvinnu, gjørdi vart við longu í frágreiðing sini í fjør, er tað av alstórum týdningi, at vit fáa útbúgvið fólk, sum eru før fyri at sita í teimum leiðandi størvunum. Og til tess krevst útbúgving.

At útbúgva fólk á ti støði, tað veri seg verkfrøðingur, búskaparfrøðingur ella samfelagsfrøðingur, tekur í minsta lagi 5 ár, og herumframt skal viðkomandi eisini hava verkligar royndir fyri at fáa neyðugt vinnuligt innlit. Hetta merkir m.a., at ungfólk, sum í dag ganga á miðnámsútbúgving, mugu kunnast um útbúgvingarmøguleikar, ið geva førleika í oljuvinnuni.

Umráðandi er eisini, at fleiri ungfólk, sum longu eru í hægri framhaldslestri, taka lærugreinir ella snara lesturin hjá sær soleiðis, at tey eftir lokna útbúgving hava vinnumøguleika eisini í oljuvinnuni.

Útbúgvingarstovnarnir eru fleiri, sum ungdómurin kann fara inn á, líka mikið hvat slag av útbúgvingum talan er um. Serliga er tað tó av áhuga at hyggja at útbúgvingum í Stóra Bretlandi og í Noregi.

Fyrimunurin við at fara til Stóra Bretlands er, at tann lesandi fær enska málið sum hjávinning í lestrinum. Hinvegin skulu føroyingar, av tí at Føroyar eru uttan fyri ES, rinda gjaldsskulagjald, ið er millum 3 og 4 ferðir so høgt sum hjá einum lesandi úr einum ES-landi. Skulu vit gera okkum von um at senda nógv fólki til Stóra Bretland í útbúgving, er alneyðugt, at Føroya Landsstýri sum skjótast fer undir samráðingar við ES um eina útbúgvingaravtalu.

At fara til Noregs hevur eisini fyrimunir í sær. Málsliga og mentanarliga eru vit tætt skyld við norðmenn, og útbúgvingarnar í Norra eru meiri nærri skyldar við útbúgvingar, sum vit kenna frammanundan. Herumframt skal einki skúlagjald latast.

Bæði tey, sum fara til Stóra Bretlands og til Noregs í útbúgvingum, sum eru goðtiknar av SU í Danmark, hava sum danskir ríkisborgarar rætt til frá SU at fáa útbúgvingarstuðul, ið rindar lívikostnaðin. Studningur fæst tó ikki til gjaldsskulagjaldið.

Arbeiðsmarknaðarútbúgvingar

Tá ið talan er um at útbúgva fólk, sum er í vinnu, er hetta eitt mál, sum má og skal loysast, og ongantíð ov skjótt. Týpiskt er talan um fólk, ið skulu umskúlast nakrar vikur ella fáar mánaðar fyri at fáa vinnuførleika innan oljuvinnuna; men av tí at hesi fólk ofta hava familju o.a. ber ikki til hjá teimum at fara í útbúgving nakrar vikur við ongari løn. Herumframt skal eisini rindast fyri skeiðini.

Í frágreiðingini til landsstýrismannin í skúlamálum, skeyt útbúgvingarnevndin upp, at ein arbeiðsmarknaðargrunnur varð settur á stovn, sum kundi loftað hesum eftirútbúgvingartrupulleika. Grunnurin skal í felag verða umsitin av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og av landsstýrinum, og hann skal taka avgerð um neyðugt skeiðsvirksemi, bæði í Føroyum, men eisini møguliga úttanlanda. Pengar til virksemi grundsins skulu latast grunninum, t.d. samsvarandi lønarútgjaldinum.

Ein tilíkur grunnur hevur møguleika at rinda skeiðsútreiðslur hjá tí enstaka, ið skal umskúlast, eins og veita honum endurgjald fyri mista løn í skeiðstíðini.

At givið hesum fólkum um skúlin/eftirútbúgving hevði fört við sær, at arbeiðsmegin í fyrstu atløgu hevði fingið hægri útbúgvingarstøði, og sostatt eisini øktar møguleikar at fingið meiri burturúr, og í næstu atløgu var arbeiðsmegin vorðin meiri líðilig, kundi útint fleiri ymiskar arbeiðsuppgávur. Í oljuvinnuni er tað just fólk við fleiri sløg av førleika (multiple skills), sum ynski er um.

Vit vita, at nógv fólk hugsa um at fáa sær eina eftirútbúging/umskúling, men so leingi figgjarligi møguleikin hjá teimum ikki er til staðar, merkir tað, at tey hava ikki ráð at ogna sær førleika, ið innan stutta tíð verður bæði teimum sjálvum og landinum til fyrimuns. Tí verður heitt á politisku myndugleikarnar eins og partarnar á arbeiðsmarknaðinum at loysa hetta málið sum skjótast.

At enda eina lítla viðmerking um enska málið, ið er tað samskiftismál, sum verður brúkt allastaðni í oljuvinnuni. At duga enskt væl og virðiliga er eitt "must" í framtíðini. Tí er tað sera hugstoytandi at siggja í "Áliti um nýggju fólkaskúlalóg", at skotið verður upp, at undirvísingin í enskum ikki skal byrja fyrr enn í 6. flokki. Við framtíðaroljuvinnuni í huga er tað hugstoytandi at siggja eitt álit, ið hugsar so lítið um framtíðarvinnu føroyinga. Skulu vit kvalifiserað vera við í oljuvinnuni – og tað haldi eg vit skulu - mugu vit øll somul duga betri enskt, enn vit duga í dag, og grundarlagið skal leggjast í fólkaskúlanum. Og tí má hugsast frameftir, so næmingarnir fyrr fáa eina skipaða undirvísing í enskum, enn teir fáa í dag.

tíðindablaðið
sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið **5 ferðir um vikuna**

- ☐ Haldarar í Føroyum: 235,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: 340,-/ársfj. (5 bløð í senn)
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir

Tað ber altíð til at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn:
Bústaður
.....
Postnr, bygd/býur
.....
Tel.:
Undirskrift:



Tekna teg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum